Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Steffan Klein Poulsen, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Seksualundirvísing á yrkis- og miðnámsskúlum

Spurningar:

1. Hvør er heimildin hjá yrkis- og miðnámsskúlum at loyva uttanhýsis felagsskapum og persónum at koma inn og hava seksualundirvísing fyri næmingum á miðnámi?
2. Hvørji ár hava uttanhýsis felagsskapir ella persónar havt seksualundirvísing fyri yrkis- og miðnamsskúlanæmingum?
3. Hava allir árgangir, t.v.s. 1., 2. og 3. árs næmingar, fingið seksualundirvísing hesi árini?
4. Hvat tilfar er lagt fram fyri yrkis- og miðnámsskúlanæmingunum árini 2017, 2018, 2019, 2020, 2021 og 2022?
5. Hvat vísindaligt grundarlag byggir tilfarið á?
6. Sleppa allir felagsskapir fram at í yrkis- og miðnámsskúlarnar at hava undirvísing?
7. Er tað komið fyri, at ein uttanhýsis felagsskapur hevur fingið noktað atgongd til yrkis- og miðnámsskúlarnar?
8. Um ja, hvørjir eru hesir felagsskapirnir?
9. Kann hugsast, at slík seksualundirvísing kemur inn í fólkaskúlarnar eisini?

Viðmerkingar:
Vika sex er eitt afturvendandi tiltak á yrkis- og miðnámsskúlunum kring landið, har næmingarnir fáa seksualundirvísing. Tiltakið er m.a. fyriskipað av Sig frá!, Fólkaheilsuráðnum, Apotekinum, Amnesty, Føroya Politi og Gigni. Seinastu árini hava hesir felagsskapir samstarvað við felagsskapin Kyn, sum hevur verið mest sjónligur og havt umboð úti á skúlunum í sambandi við Viku sex. Spurningurin er settur fyri at fáa greiði á, hvør heimildin er hjá yrkis- og miðnámsskúlum at loyva slíkum felagsskapum inn, hvat fyri seksualundirvísing næmingarnir fáa, og um hetta kemur inn í fólkaskúlarnar.

Á Løgtingi, 4. mars 2022

Steffan Klein Poulsen